# Skatting av pensiónsinngjøldum



ELI BRIMSVÍK
formaður í Havnar Handverkarafelag

Nú fíggjarmálaráðharrin, Jóannes Eidesgaard, hevur fingið ta genialu idé at skatta inngjøld heldur enn útgjøld av pensiónsuppsparingum, eru nógvir ósvarðaðir spurningar. Veit væl, at Jóannes fer at siga, at málið bert er í stoypiskeiðini enn.

So vítt eg havi frætt var hetta eitt uppskot, sum stjórnin í Íslandi hevði í umbúna at seta í verk har, men sum man síðani er gingin frá aftur. Helst tí, at tað ikki er nøkur góð loysn.

Ein stórur spurningur, sum enn ikki hevur verið frammi alment, er útgjaldið.

Hvussu ætlar man, at tað verður útgoldið?

Sum er verða penións-gjøld skattað sum vanlig a-inntøka. Kundi hugsað mær at vitað, hvussu verður við tí partinum. Gamaní hevur landið rætt til skattin av pensiónsgjøldunum, men einasta trygd, vit vanligu lønmóttakarar hava fyri ikki at rinda dupultan skatt er, at inngjøldini verða skattað við útgjald.

So eitt hjartasuff afturat. Skilji á lagnum, at henda pensiónsætlan ikki er galdandi fyri okkara háttvirdu politikarar. Og eg, sum trúði, at vit øll vóru eins fyri lógini.

Men hettar er dupultmoralurin, tá ið hann er bestur; vit løggeva bara fyri at Palliba og Marsanna skulu gjalda gildið, meðan vit politikkarar ganga fríir. Sera smart, men ótrúliga smagleyst.

Ein politikari skal einans hava sitið tvær setur á tingi, so fær hann fulla pensión, uttan at hava goldið eitt fimm oyra sjálvur, meðan Palliba skal arbeiða útivið 40 ár fyri at uppnáða fult gjald, afturat hesum skal hann gjalda pensiónina hjá politikarunum. So her er munur á monnum: **Var tað onkur, sum segði, at stattarstíðið var av :)**

Ótrúligt, at eingin politikari enn hevur sett spurnartekin við óskilið, men tað vísir bert hugburðin sum tykist at verða, at sektin á hvat annar fær, eg skal nøra mær. Síggi annars í Sosialinum fyri 10. desember, á blaðsíðu 12, at Bjørt Samuelsen mælir til at gera upp við ótrúligan dupultmoral. Eg kann bert taka fult undir við henni í hesum, men Bjørt, dupultmoralur er ikki bert í sambandi við ølbryggjan, men sanniliga eisini í so nógvum øðrum í samfelagnum, sum polittikkarar ganga á odda fyri, so gott í teg, fær tú bara í gongd við uppruddingina, ongantíð ovskjótt.

E/S Um onkur politikari følir seg stoyttan av hesum, var tað eisini meiningin.

Annars ynski eg øllum eini gleðilig jól, og eitt vælsigna nýggjár.

# Halt oljuna uttan fyri stríðið við bankarnar



HENDRIK EGHOLM
stjóri á Magn

**Tað er órímiligt av landsstýrismanninum í fíggjarmálum at draga Magn og prísir á olju upp í ideologiska stríðið við bankarnar. Serliga tá fakta er, at húsarhald í Føroyum gjalda minni fyri oljuna enn donsk húsarhald – eisini tá skattir og avgjøld á olju eru tikin frá**

Oljan til húsarhald í Føroyum er bíligari enn í Danmark. Eisini tá skattir og avgjøld eru tikin frá. Hetta vænti eg, at fíggjarmálaráðharrin ella ráðgevarar hansara vita, og tí burdi hann ikki drigið oljuna inn í stríðið við bankarnar.

**Gassolja í Føroyum er bíligari enn í Danmark**

Á røðarapallinum í Løgtinginum dró landsstýrismaðurin oljuprísir og prísáseting av olju upp í eitt orðaskifti um bankalán og rentur. Eg skal ikki fara inn á bankalán. Tey eru ikki mítt øki. Hinvegin vil eg loyva mær at gera nakrar fáar viðmerkingar til oljuprísin.

Tað er eitt faktum, at oljan til húsarhald, gassoljan, er bíligari í Føroyum enn t.d. í Danmark og Noreg. Eisini tá skattir og avgjøld eru drigin frá. Tá fíggjarmálaráðharrin á tingsins røðarapalli eftirlýsti at fáa eins bílig reallkreditt lán í Føroyum sum í Danmark, er tað eitt mál, sum einki hevur við oljuprísir at gera. Tí gassoljan til føroyska húsarhaldið er eitt dømi upp á vøru, sum ikki einans er *eins* bílig og í Danmark, hon liggur *undir* danskar prísir.

Gassoljan er okkara mest týðandi oljuvøra, og hon er ein týðningarmikil útreiðsla fyri føroyska húsarhaldið. Júst tí er tað serstakliga jaligt fyri føroysku húsarhaldini og Føroyar sum heild, at gassoljan verður seld fyri ein sámiligan prís. Vónandi kunnu fíggjarmálaráðharrin og eg semjast um, at ein prísur, sum liggur undir tí donsku prísinum, eisini tá skattur og avgjøld eru drigin frá, er ok.

Um somu tíð sum Jóannes Eidesgaard viðgjørdi rentur og oljuna, var stórur munur á gassoljuprísunum í Føroyum og Danmark.

Hendan dagin var gassoljan 2,64 kr. bíligari við øllum avgjøldum, **og 57 oyru bíligari uttan avgjøld**! Bíligari í Føroyum, skilst!

Framvegis er munurin á leið tann sami.

Kennir tú nakra aðra vøru, sum er bíligari at keypa í Føroyum enn í Danmark, tá skattir og avgjøld eru tikin frá? Tað skuldi líka verið kranavatn.

Samfelagstýdningurin av góða prísinum á gassolju er stórur. Eini vanlig sethús brúka 3.000-3.500 litrar av gassolju um árið. Og vit hava umleið 17.000 sethús í Føroyum, harav væl størsti parturin hava gassolju sum hitakeldu. So tað krevur ikki tað stóra at rokna seg fram til, at góðu prísirnir á gassolju eru nógvar, nógvar milliónir verdar fyri føroyska húsarhaldið!

**Kappingarráðið kannar oljuprísirnar**

Í løtuni er Kappingarráðið – eftir politiskum ynski – í gongd við eina kanning av oljuprísum. Tað er gott, og vit síggja fram til úrslitið av kanningini. Vit vita, at niðurstøðan hjá Kappingarráðnum er grundað á fakta og skjalprógvaði tøl, og ikki mytur.

Vit á Magn vænta ikki, at Jóannes Eidesgaard, ella nakar annar, skal rósa okkum fyri okkara prísir á gassolju til føroyska húsarhaldið. Men eg vóni, at ein so týðandi almennur autoritetur sum fíggjarmálaráðharrin framyvir ikki blandar rentur og oljuprísir saman og koyrir alt í ein pott. Tað er eitt sindur órímiligt.

Tí vit á Magn megna at selja okkara høvuðsvøru bíligari enn í Danmark, eisini tá skattir og avgjøld eru tikin frá.

Um fíggjarmálaráðharrin, ella onnur áhugaði, hava hug at fáa skjalprógv fyri tí eg føri fram, vinarliga seti tykkum í samband við meg á 237410 ella hendrik@magn.fo

# Monika Staus Joensen og hennara ferð í tónleikaheiminum



FRITS JOHANNESEN

**Onkuntíð tykjast umstøðurnar í tónleikaheiminum at hanga saman á ein hátt, at tú undrast yvir streymin í hesum ráki. Monika er ættað úr Schweiz og býr í Leirvík. Fredric Balazs er ættaður úr Ungarn (Budapest) føddur 1919 og býr í Amerika**

**Fredric Balazs**

Fredric Balazs gjørdist konsertviolinistur og konsertmeistari í symfoniorkestrinum í Budapest bert 17 ára gamal. (f. 1919 ) Hann kendi fløvan av hondum Bruno Walters, Toscaninis, Ormandys og Furtwänglers. Hesir orkesturleiðarar góvu honum íblástur - ein førning bæði í ljóði og fimi til hansara skapandi gongd í tónlistini. Balazs gjørdist ikki bert góður tónlistamaður, men bleiv eisini ein góður komponistur.

Hann fór til Amerika og var við í Seinna heimsbardaga. Hetta var í 1941 aftan á álopið á Pearl Harbor. Tá ið hann kom heimaftur eftir bardagan, fekk hann heiðurin at verða fastur limur í amerikanska felagsskapinum fyri tónaskøld. Hetta var sum tøkk fyri luttøkuna í krígnum.

23 ára gamal varð hansara Divertimento spæld í California, har altjóða felagsskapurin fyri nútíðartónleiki var savnaður. Tónsetingar hansara vórðu t. d. samanbornar við Bartok og Shostakovich, og høvdu gott orð á sær. Um tónleik hansara kann í stuttum verða sagt, at hann er syrgiligur, lyriskur, romantiskur og stórbarur í sínum skapi. Vit kunnu eisini nevna, at hansara strúkikvartett hevur fingið fleiri heiðursmerki og er samanborin við frægu kvartettina hjá Shostakovich. Hetta vóru nøkur orð um Fredric Balazs.

**Fredric Balazs og Monika Stauss Joensen**

Balazs fær ofta áheitanir um at skriva tónleik til ymisk ljóðføri og skrivaði Monika brævtil hansara um at fáa tónleik frá honum fyri klaver og violin til Summartónarnar 1998. Hann gav Stamen og Moniku eina sonatu fyri klaver og violin. Tá ið hann hoyrdi, at tey fóru at spæla hana, avgjørdi hann at koma at vitja. Balazs kom líka úr USA til Føroyar at lurta eftir sonatuni, og gjørdu tey av at spæla dupultkonsertina av Bach, har Monika og Balazs spældu violin og Stamen klaver. Ja, pappírið er tolið, og var tað við darrandi penni, at Monika skrivaði til hendan mæta tónlistamann. Tá ið Balazs kemur heimaftur, skrivar hann eina partitu(suitu) fyri soloviolin í 4 pørtum, ognar Moniku hetta verk og varð hetta tónleikastykki frumframført á einum altjóða Bachfagnaði í Scaffhausen í Schweiz. Hetta gjørdi hann, sum eina tøkk til Moniku fyri blíðskapin, meðan hann vitjaði í Leirvík.

2001 fór Monika og Helena Ringenberg til Amerika. Tað var sjálvur Balazs, sum bjóðaði teimum at koma yvir til Sn Luis Obispo, sum liggur millum Los Angeles og Francisco. Monika Spældi violin, og Helena spældi cembalo.

2005 fara Ólavur Jacobsen og Monika aftur til Amerika. Òlavur spælir gittar og Monika violin. Her spæla tey aftur eitt stykki av Balazs, og Monika spælir 2 partar av Solosuituni í Sn Luis Obispo.

**Monika og Elzbieta Wiedner –Zajac**

Hesin poetiski streymurin førir Moniku í samband við eitt tónaskald, sum eitur Elzbieta Wiedner – Zajac, polskt tónaskald og úrmælingur á klaverinum. Jóhannes Andreasen hevði Elzbietu sum lærara, meðan hann las í Wien. Í febr. Í 2007 kom Elzbieta til Føroya á konsertferð. Tað var Konsertfelagið, sum skipaði fyri hesi ferð. Her komu Monika og Elzbieta at kennast. Tær avtala, at hava eina konsert saman og 8. Septembur í ár, høvdu tær eina konsert í Bösendorfer Saal í Wien. Á skránni var aftur Partitan, sum Balazs hevði ognað Moniku, og hesin poetiski stimin av fragdargóðum ljóði gav Elzbietu Widner - Zajac íblástur til at skriva eitt preludium fyri violin og klaver, sum hon ognaði Moniku.

**Jenö Takács**

Á skránni var eisini eitt tónleikastykki av Jenö Takács ( 1902 -2005), sum bleiv yvir hundrað ára gamal. – Aus dem Zyklus” Von Nah und Fern op. 11 für klavier, (ognað Ann Gibbens Davis) nr. 15 “Abendlied”(Ungarn) og Nr. 7 “ Spoitlied” (Ungarn).

Tackács varð borin í heim í Cinfalva í Ungarn. Sum ungur las hann tónleik á tónleikaháskúlanum í Wien, og hevði Joseph Marx í tónseting og Paul Weingarten í klaverspæli. Tackács og Bela Bartaók vóru væl, og var góður andi teirra millum frá 1926, til Bartók fór til Amerika í 1940. Nevnast kann, at Tackács var professari við lærda háskúlan í Cairo frá 1927 til 1932, har hann granskaði í arabiskum og eygisptiskum tónleiki. Tað, sum eisini er áhugavert her, er, at Balazs og Takács vóru vinmenn, so alt er ein røringur av einum tónaslátti, sum tú kanst halda er tilvildarligur, men kanska er at siga, at hendan “heilaga tónleikafamilja” er kanska ikki so stór, og tú veitst.... kennir tú fimm fólk, so kennir onkur teirra onkran, sum kennir pávan. Nei, eg hugsi bara tað, at keðiligt er tað ikki, tá ið tónleikurin tvinnar løturnar saman í listaligar tónleikamyndir. Flestu tónleikarar hava upplivað fleiri slíkar, og Monika er ein teirra.